# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 26.08.2024 kl. 20.30

Á fundi: Janus Thomsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Martin í Nesi
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Janus Thomsen

**1.**
**Umsókn um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 117b, Hvalba.**

Søkt verður um byggiloyvi til útbygging av gróthúsi, sum stendur á trøð matr.nr. 117 b í Hvalba.
**Tekniska nevnd 23.08.2024:**
Nevndin mælir til at fylgja avgerðini hjá byggimálsviðgeranum.
**Avgerð:**
Samtykt var einmælt at beina málið aftur í Teknisku nevnd og leggja umsóknina fyri Friðingarmyndugleikarnar áðrenn endalig avgerð til málið verður tikin.

**2.**
**Sáttmálin um skúlabarnaflutning.**

Ynski er frá MP bussar at leingja verandi sáttmála viðvíkjandi skúlabarnaflutningi.
**Trivnaðarnevnd 21.08.2024:**
Nevndin mælir til at leingja sáttmálan skúlaárið 2024/2025.
**Fíggjarnevnd 26.08.2024:**
Nevndin mælir til at fáa ein fundi í lag við MP busssar um leingjan av sáttmálanum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í Fíggjarnevndina.

**3.**
**<u>Avtala við Prestfjall sunnari partur viðvíkjandi moldgoymslu.</u>**

Ynski er frá Prestfjalli sunnari partur um at leingja avtaluna um moldgoymslu.
Málið hevur verið lagt fyri lokala friðingarmyndugleikan og yvirfriðingarmyndugleikan, umframt Tjóðsavnið, sum øll eru komin við sínari niðurstøðu.
**Tekniska nevnd 13.11.2023**:
Nevndin mælir til at leingja sáttmálan við teimum treytum sum fyriliggja og vita um kommunan kann leingja sáttmálan í 10 ár.
**Fíggjarnevnd 26.08.2024:**
Nevndin mælir bygdarráðnum til at leingja sáttmálan við Prestfjall sunnara parti við 2 árum, sum er góðkent av friðingarmyndugleikanum og við støði í ásetta kostnaði.
**<u>Avgerð:</u>**
Einmælt samtykt at fylgja tilælinum frá Fíggjarnevndini og Teknisku nevnd og leingja avtaluna við 2 árum.

**4.**
**<u>Reglugerðin fyri bátahylin – uppskot til dagføring.</u>**

Reglugerðin er tillagað nakað, so møguleiki er at taka gjald fyri gestabátar og geva pláss til 2 bátar í hvørjum bási, har tað er møguligt.
**Vega og Havnanevndin 23.08.2024:**
Nevndin mælir til at dagføra reglugerðina sambært uppskoti.
**Fíggjarnevnd 26.08.2024:**
Nevndin mælir til at dagføra reglugerðina sambært uppskoti.
**<u>Avgerð:</u>**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá nevndunum.

**5.**
**<u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundur lokin kl. 21.35

Janus Thomsen Niels Olaf Eyvindsson Eir J. Norðberg Martin í Nesi

Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen